**UTTAN ÚR HEIMI**

## Friðarætlan skal á borðið nú

Fyrrverandi amerikanski uttanríkisráðharrin, James Baker, sigur, at tann ætlaða altjóða friðarætlanin fyri Miðeystur eigur at verða løgd fram sum skjótast.

Baker, sum var uttanríkisráðharri í stjórnini hjá George Bush eldra, sigur í samrøðu við sjónvarpið ABC, at friðarætlanin, sum ST, ES, USA og Russland hava gjørt, skal á borðið sum skjótast. Samstundis skulu teir einstøku partarnir fáa at vita, at undantøk og treytir verða ikki góðkend, segði hann. Sjálvur helt Baker, at kríggið ímóti Irak er eitt gott grundarlag fyri komandi samráðingum um frið millum ísraelsmenn og arabarar.

Friðarætlanin ber millum annað í sær, at palestinar skulu hava sítt egna ríki í seinasta lagi í 2005, men ísraelski forsætisráðharrin, Ariel Sharon, hevur sagt, at hann vil hava minst hundrað broytingar í ætlanini.

## Loyniligt vápn rýmdi

Tá amerikansku hermenninir herfyri komu til Kuwait, høvdu teir sina servanda delfin við sær. Hana ætlaðu amerikanarar at nýta til at leita eftir møguligum irakskum minum innast í Persaflógvanum.

Men sunnudagin kunngjørdi amerikanska herleiðslan í Qatar, at hon hevði mist sambandið við delfinina, og at hon eftir øllum at døma var rýmd. Delfinin var á sínari fyrstu kanningarferð uttan fyri iraksku havnarbýirnar Umr Qasr og Basra, tá hon brádliga hvarv. Hildið verður, at hon er farin út á djúpt vatn onkunstaðni longri úti í Persaflógvanum.

Amerikanski herflotin hevur fýra delfinir, sum hava fingið servenjing í at leita eftir minum.

## Var hon uppií?

Serbisku myndugleikarnir bendu sunnudagin á, at kona fyrrverandi forsetan, Slobodan Milosevic, hevði tilknýti til teirra, sum myrdu Zoran Djindjic, forsætisráðharra tann 12. mars.

Zarko Korac, innanríkisráðharri, segði ikki beinleiðis, at fyrrverandi forsetafrúan, Mira Markovic, hevði nakað við morðið at gera, men hann gjørdi greitt, at hon er partur av teimum kreftum, sum vildu hava Zoran Djindjic beindan av vegnum. Mira Markovic í Russlandi, men sambært serbisku myndugleikunum hava russar lovað at útflýggja hana, so hon kann avhoyrast í sambandi við tilburðin, tá serbiski forsetin, Ivan Stambolic, varð myrdur í august í 2000. Sjálv hevur Mira Markovic sagt, at hon hevði einki við hetta morðið at gera.

Síðani Zoran Djindjic varð skotin í Beograd, hevur serbiska løgreglan tikið umleið 2.000 fólk, sum eru sett í varðhald, meðan málið verður kannað. Løgreglan hevur illgruna um, at ein fyrrverandi løgregluovasti legði morðið til rættis, men enn hevur løgreglan ikki funnið hann.

## Meirilutin fyri ES heldur sær

Flestu norðmenn tykjast nú hava tikið støðu til spurningin um norskan limaskap í Evropasamveldinum.

Ein meiningakanning í gjár vísti, at 49,5 prosent av veljarunum taka undir við limaskapi, og hetta er á leið tað sama sum í undanfarnum kanningum. Kortini minkar munurin. Sambært kanningini eru 38,1 prosent ímóti limaskapi í ES, og tað er ein vøkstur upp á 1,7 prosentstig samanborið við seinastu kanning.

Nýggja kanningin vísir, at flestu menn í Noregi vilja sleppa upp í ES, meðan kvinnurnar eru í tveimum líka stórum pørtum. Av monnunum siga 57 prosent ja og 34 prosent nei. Hjá kvinnunum er býtið 43 og 42 prosent. Samstundis vísir kanningin, at undirtøkan fyri ES-limaskapi er størst í Oslo og har á leið, men fólk á bygd yvirhøvur eru ímóti at fara upp í ES.

# Bagdad verður eitt blóðbað og USA fer at tapa

**Ein av heimsins fremstu krígssøgumonnum heldur, at bardagin um Bagdad verður eitt blóðbað og kann enda sum bardagin um Grosnyj.**



KRÍGGJ Í IRAK
*Árni Joensen:*

Søguprofessarin Martin van Creveld, sum arbeiðir á hebraiiska lærda háskúlanum í Jerusalem, verður mettur sum ein av teimum fremstu søgukønu, tá tað snýr seg um kríggj og krígsførslu.

Hann hevur eisini gjørt sær sínar metingar um tann komandi bardagan um irakska høvuðsstaðin. Creveld heldur, at amerikanarar hava undirmett uppgávuna, og hann heldur tað vera rættiliga sannlíkt, at USA fer at enda sum tapari í krígnum í Irak.

- Einum nýtist ikki at vera snillingur í krígssøgu fyri at skilja, at tað letur seg ikki gera at taka Bagdad við 120.000 hermonnum, sigur Martin van Creveld og sipar til, at amerikanarar og bretar hava einar 120.000 hermenn í Irak. Seinni hevur USA gjørt av at tvífalda hermannatalið.

Martin van Creveld hevur ofta hildið fyrilestur á amerikanskum hernaðarskúlum, og bøkur hansara eru partur av lesnaðinum hjá amerikanskum heryvirmonnum.

Annars ásannar Creveld, at álopið hevur gingið skjótari enn væntað. Hetta er fyrstu ferð, at ein innrásarherur hevur tikið seg seg 400 kilometrar fram eftir minni enn einari viku, sigur hann.

# Fleiri sjálvmorðsatsóknir

**4.000 sjálvbodnir arabar eru komnir til Irak og hava boðið sær til at taka lut í sjálvmorðsatsóknum ímóti amerikanarum og bretum. Tað sigur ein irakskur generalur.**



*Iran og Sýrialand mugu gevast við at hjálpa yvirgangsmonnum. Annars noyðast londini at átaka sær avleiðingarnar av hesum, sigur Colin Powell*

KRÍGGJ Í IRAK
*Árni Joensen:*

- Teir koma úr øllum tí arabiska heiminum, og allir eru teir til reiðar at taka lut í sjálvmorðsatsóknum. Teirra fyrimynd er maðurin, sum fyri nøkrum døgum síðani sprongdi eina sjálvmorðsbumbu og drap fýra amerikanskar hermenn.

Tað sigur irakski generalurin, Hazem al-Rawi.

Víðgongdi palestinski felagsskapurin, Islamskt heilagt kríggj, boðaði um vikuskiftið frá, at hann hevur sent fleiri sjálvmorðsbólkar til Irak.

- Teir fyrstu sjálvbodnu eru komnir til Bagdad. Teir fara at stríðast ímóti amerikansku og bretsku deildunum í Irak til tess at verja arabiskt og muslimskt land, stóð í einari kunngerð frá høvuðsstøðini hjá felagsskapinum.

Irakski varaforsætisráðharrin, Tariq Aziz, segði sunnudagin, at teir fremmandu sjálvmorðsbumbumenninir eru hetjur. Teir eru frælsisstríðsmenn, sum eru til reiðar at stríðast ímóti fremmandum álops- og hersetingarmonnum, segði hann.

### USA ávarar

Amerikanska stjórnin ávarar Iran og Sýrialand ímóti at styðja yvirgangsbólkar. Hetta er aðru ferð, at USA ávarar sýrar.Amerikanarar vilja vera við, at Sýrialand hevur veitt Irak hjálp í krígnum ímóti amerikansku og bretsku hermonnunum. Men tað verður ikki góðtikið í Washington.

- Sýrialand velur sjálvt, um tað ætlar at halda fram við at styðja yvirgangsfelagsskapum og tí doyggjandi stýrinum hjá Saddam Hussein, ella um landið velur eina skilabetri kós, segði amerikanski uttanríkisráðharrin, Colin Powell, sunnudagin. Hann legði afturat, at sýriska stjórnin má sjálv átaka sær ábyrgdina av teimum avleiðingum, sum politikkur hennara kann fáa.

Samstundis ávara amerikanarar Iran. Colin Powell segði sunnudagin, at tað kann koma Iran aftur um brekku, stuðlar landið yvirgangsfelagsskapum.

Hendan seinna ávaringin kom, júst sum iranski uttanríkisráðharrin, Kamal Kharazi, gjørdi greitt, at Iran fer ikki at viðurkenna eina nýggja irakska stjórn, sum amerikanarar tilnevna.

-Vit fara bert at viðurkenna eina nýggja stjórn í Irak, sum verður skipað undir ST-eftirliti, og sum irakska fólkið sjálvt hevur valt, segði Kharazi.



# Harley Davidson - nú umboð í Føroyum


*Kristi himmalferðardag 29. mai verður opið hús á Barnaheiminum í Havn, har børnini fáa leikur og peningagávu handaða (myndin er frá eini vitjan í 1999)*


*Formaðurin í áhugafelagnum Føroya Ellisakfør, Ingi Justinussen, koyrir eisini við Harley Davidson*

**Í Føroyum eru umleið 250 skrásettar motorsúkklur, harav 14 eru Harley Davidson. Ove Ritter í Havn er blivin umboð fyri Harley Davidson motorsúkklurnar í Føroyum. Í hesum sambandi er ein framsýning í SMS (3-arin) frá 26. mars til 12. apríl**




MOTORSÚKKLUR
*Magnus Gunnarsson*

Tær heimskendu Harley Davidson motorsúkklurnar hava nú fingið umboð í Føroyum. Tað er fyritøkan HD-fo v. Ova Ritter ið er umboð fyri donsku Harley Davidson fyritøkuna CAPS-HD. Ove Ritter stendur fyri søluni, Árni Hansen er servicemaður og Jan Nolsøe stendur fyri verkstaði, viðlikahaldi og umvælingum.

Endamálið hjá HD-fo er at so nógv fólk sum gjørligt fáa møguleikan at ogna sær eina Harley Davidson motorsúkklu. Umframt sjálvar súkklurnar útvega teir Harley Davidson klæðir í besta kvaliteti til vaksin og børn.

Harley Owner Group (HOG) er heimsins størsti motorsúkklufelagsskapur við umleið 700.000 limum um allan heim. Limir í hesum felagsskapi koma úr øllum samfelagsstættum. Teir eru fríir fyri allar bindingar til motorsúkkluumhvørvið og eru politiskt og fíggjarliga óbundnir hvør av øðrum. Limirnir er bert saman fyri at hava góðar upplivingar og njóta teirra felags áhugamál, Harley Davidson motorsúkklurnar. Skipað verður fyri túrum fyri einstaklingar og familjur, eisini túrar uttanlands.

### Innsavning til Barnaheimið

Vanligt er at Harley Davidson felagsskapir gera nakað fyri børn. Her hjá okkum savnar felagsskapurin pening til Barnaheimið í Havn. Peningurin er oyramerktur til eina ferð fyri børnini á Barnaheiminum í Havn í summar. Í hesum sambandi er ætlanin at hava opið hús á Barnaheiminum Kristi Himmalferðardag tann 29. mai, har motorsúkklistar úr Danmark og Svøríki eisini vera við. Donsku og svensku gestirnir hava leikur við til børnini og ein peningagáva verður handað. Børnini sleppa eisini ein túr á baksetrinum á Harley Davidson motorsúkklunum.

Tey, ið ynskja at stuðla ferðini hjá børnunum á Barnaheiminum í summar, kunnu seta pening inn á eina klientkonto hjá Annfinn V. Hansen advokati, konto í Føroya Banka: 6460 1022875.

Adressan hjá HD-fo er: Djóna í Geilsgøta 33 FO-100 Tórshavn. Tel. 210405. Harley Davidson motorsúkklur verða sýndar fram í SMS (3-arin) frá 26. mars til 12. apríl. Fáið meira at vita á heimasíðuni: www.hd-fo.dk


*Børnini sleppa ein túr á baksetrinum á eini Harley Davidson motorsúkklu*

## 100 ár við Harley Davidson

**Heimskendu amerikansku Harley Davidson motorsúkklurnar hava nú verið á marknaðinum í 100 ár. Harley Davidson vórðu millum tær fyrstu hópframleiddu motorsúkklurnar í heiminum**

MOTORSÚKKLUR
*Magnus Gunnarsson*

Tað vóru barndómsvinirnir Arthur Davidson og Bill Harley, ið stovnaðu Harley Davidson motorsúkkluverksmiðjuna í Milwaukee í Wisconsin í USA í 1903. Fyrsta árið vóru bert tríggjar súkklur framleiddar, men tað gekk tó skjótt framá. Í 1911 vóru framleiddar 5625 súkklur. Hetta varð eisini árið, tá hópframleiðslan av motorsúkklunum við tveimum sylindarum byrjaði. Hendan súkklan við V2 motorinum bleiv ímyndin av Harley Davidson motorsúkklunum.

Hóast Harley Davidson motorsúkklurnar hava fingið harða kapping frá súkklum sum t.d. Triumph, Norton, BSA og seinnu árini frá japansku motorsúkklunum, hava tær klára seg væl gjøgnum hesi hundrað árini. Tær blivu serliga kendar tá Peter Fonda og Dennis Hopper í filminum »Easy Rider« koyrdu á einar umbygdari Harley Davidson í 1969.